| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**19. juli 2004** | Blað nr.: **5939**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **19. juli 2004** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **100/04-103/04**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Jan Christiansen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jákup Suni Joensen
Høgni Mikkelsen
Bjarti Mohr
Schumann Hjaltalin
Sjúrður Olsen
Beate L. Samuelsen
Tórfinn Smith
Elin Lindenskov
Hildur Eyðunsdóttir
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Jan Christiansen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Jens M. Poulsen
Janus Isfeldt

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM:

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**100/04** **200400803**

**Umsókn frá Alzheimerfelagnum, dagfest 15. mars 2004, um fígging av "Miðstøð fyri minnisveik" í Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Felagið hevur møguleika at leiga eini hús mitt í Havnini og søkir í hesum sambandi um fígging til eina 2 ára royndarverkætlan til at stovna og reka eina ”Miðstøð fyri minnisveik”.

Umsókn er eisini send Almanna- og heilsumálaráðnum.

Felagið ynskir fund við nevndina um málið og eisini at fáa kunning um gongdina í Vallalíð og um ætlaninar við Tjarnagarði.

**Sosiala nevndin 30. mars 2004:** Fyri felagið møttu Sigrún Mohr, Erna Háberg og Randi Absalonsen og greiddu frá verkætlanini.

Hóast hetta er ein landsuppgáva burturav, heldur nevndin verkætlanina vera somikið áhugaverda at samtykt varð at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, í eini 2 ára royndartíð at játta 50% av útreiðslunum, treytað av at landið ber restina av kostnaðinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd, treytað av at kommunala játtanin ikki ávirkar játtanina frá landinum til komandi dagtilhald fyri minnisveik á Tjarnargarði og at senda málið til landsstýrið.

**Ískoyti:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 10. juni 2004, boðað Alzheimersfelagnum frá, at við ávísum treytum hevði ráðið játtað at rinda 50% av verkætlanini.

Játtanin úr landskassanum er fyri 2005 og 2006 tó treytað av, at peningur verður settur av á løgtingsfíggjarlógini fyri 2005 og 2006

| 2004 | 2005 | 2006 | Íalt |
|---|---|---|---|
| 418.870 kr. | 652.740 kr. | 326.370 kr. | 1.397.980 kr. |

Kommunan hevur fingið at vita, at treytaða játtanin úr landskassanum ikki ávirkar játtanina til dagtilboðið fyri minnisveik á Tjarnargarði.

Vísandi til samtyktina hjá fíggjarnevndini dagfest 13. mai 2004 verða játtaninar frá kommununi tær somu sum frá Almanna- og heilsumálaráðnum, kr. 418.870, fyri 2004 og verður biðið um at játta nevndu upphædd í ár, og at restupphæddin verður sett av á fíggjarætlanini fyri 2005 og 2006 undir konto 40.

Kommunan eigur at treyta sær eitt umboð í visitatiónsnevndina og eisini skal kommunan á hvørjum ári hava grannskoðaðan roknskap og ársfrágreiðing.

**Fíggjarnevndin 19. juli 2004**: Samtykt at játtað 418.870 kr. av regulerings-kontoini í 2004 og at játtað omanfyri ásettu upphæddir í fíggjarætlanini fyri 2005 og 2006, treytað av at landið játtar samsvarandi upphæddir.

**Býráðið 19. juli 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Bjarti Mohr fór av fundi meðan mál nr. 101/04 varð viðgjørt.

**101/04** **200401502**

**Viðv. leigusáttmálanum millum Tórshavnar Skipasmiðju og Tórshavnar kommunu og Tórshavnar Havn.**

Í sambandi við at skipasmiðjan hevur avhandað skipasmiðjuvirksemi sítt, er skriv komið frá Advokatfelagnum, dagfest 4. juni 2004, um at avhendingin verður skipað á tann hátt, at p.f. Tórshavnar Skipasmiðja setur á stovn dóttirfelag, sum síðani yvirtekur allar fastar ognir o.a. hjá felagnum, og tá ið hetta er gjørt, yvirtekur Notio Framtaksfelag p.f. partabrøvini frá skipasmiðjuni.

Biðið verður um loyvi at nýggja felagið kann yvirtaka verandi leigusáttmálar fyri lendið.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Leivur Hansen og Schumann Hjaltalin, metir, at rættast er, at Tórshavnar Havn umsitur sáttmálan og beinir málið í havnanevndina til ummælis/viðmerkingar og til gerð av nýggjum sáttmála at leggja fyri fíggjarnevndina og býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, vil lesa og seta seg inn í verandi sáttmála, áðrenn málið verður sent havnanevndini.

**Tilmæli:**
Av tí at málið ikki kann dragast út og tí hetta er sent havnanevndini, sum hevur fund aftur aftaná summarsteðgin, mælir kommunustjórin til, at umsøkjarin fær boð um, at nýggja felagið í prisippinum (í prinsippinum merkir, at virksemið kann halda áfram) kann yvirtaka leigumálið, og at nýggjur leigusáttmáli verður gjødur, har treytir o.a. verður viðgjørt.

**Býráðið 24. juni 2004:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í 2002 bygdi Tórshavnar Skipasmiðja nýggjan smiðjubygning á grundøkið, sum Havnar Fiskacentralur stóð sum leigari av. Tá bleiv gamli sáttmálin við Havnar Fiskacentral avlýstur, og nýggjur sáttmáli bleiv gjørdur við Tórshavnar Skipasmiðju um matr. nr. 970r.

Sáttmálin viðvíkjandi 969g og 970m er av fyrstan tíð gjørdur í 1937 við fleiri broytingum upp gjøgnum árini.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til

<u>at</u> nýggja felagið yvirtekur verandi leigusáttmála fyri matr. nr. 970r.
<u>at</u> verandi sáttmáli viðvíkjandi matr.nr 969g og 970m verður avlýstur.
<u>at</u> nýggjur sáttmáli, við sama orðaljóði sum fyri matr. 970r, verður gjørdur við nýggja felagið.

**Havnanevndin 15. juli 2004:** Havnanevndin mælir til, at áðrenn endalig støða verður tikin til sáttmálan, skulu partarnir viðgera §7, í uppskotinum til nýggjan sáttmála, nærri. Málið verður lagt aftur fyri havnanevndina.

- Samráðingar hava verið við leigaran. Frágreiðing verður løgd fyri fundin.

**Havnanevndin 19. juli 2004:** Ein meiriluti, Høgni Mikkelsen, Leivur Hansen, Tórfinn Smith og Jákup Suni Joensen mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at P/F Tórshavnar Skipasmiðja yvirtekur verandi leigusáttmála fyri matr. nr. 970 $^{r}$.

At verandi sáttmáli viðvíkjandi matr.nr 969 $^{g}$ og 970 $^{m}$ verður avlýstur.

At nýggjur sáttmáli, við sama orðaljóði sum fyri matr. 970 $^{r}$ , verður gjørdur við nýggja felagið um matr.nr 969 $^{g}$ og 970 $^{m}$

Ein minniluti Shumann Hjaltalin tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. juli 2004:** Ein minniluti, Leivur Hansen og Jan Christiansen, mælir býráðnum at taka undir við Havnanevndini.

Ein annar minniluti, Schumann Hjaltalin og Heðin Mortensen, tekur undir við

- ?? at Tórshavnar Havn umsitur sáttmálarnar á havnaøkinum.
- ?? uppskotinum til sáttmála, tó við teirri broyting, at fyrsta petti í §7 verður orðað soleiðis: "Leigarin kann ikki uttan loyvi frá útleigaranum framleiga ella avhenda einstaklingi ella felagi alt ella partar av leigaða økinum"
- ?? og mæla til at allir sáttmálar á havnaøkjum fáa omanfyri nevndu áseting.

**Býráðið 19. juli 2004:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá Schumann Hjaltalin og Heðin Mortensen, í fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin og Beate L. Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Jan Christiansen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov og Leivur Hansen

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá Jan Christiansen og Leivur Hansen, í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Ímóti atkvøddu: eingin

Greiddi ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Beate L. Samuelsen og Hildur Eyðunsdóttir.

**102/04** **200302171**

**Útbygging av Kollafjarðar skúla**

**Mentamálanevndin 19. september 2001:** Kollafjarðar skúli: Samtykt at velja Jákup Suna Joensen, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Gunnleyg Durhuus og Ova Mortensen. Knýtt at nevndini eru Kristian Martin Dam úr KÍF og Karin Hammer fyri Kollafjarðar skúla.

**Uppískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt saman við skúlanum um gerð av byggiprogrammi og dispositiónsuppskoti, har Rúni Abrahamsen, arkitektur, hevur verið ráðgevi.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp at lata 8. og 9. flokk ganga í skúla í Kollafirði, soleiðis at næmingarnir kunnu verða í bygdini og sleppa undan at ferðast aftur og fram til Havnar. Eisini er stórur tørvur á skúlahølum í Havnini.

Hølistørvurin fyri útbygging av skúlanum verða 6 nýggjar skúlastovur og bókasavn/námsdepil. Tann samlaða útbyggingin verður uppá uml. 900 fermetrar.

Byggingin verður býtt upp í 2 byggistig, har skotið verður upp, at:

1. byggistig — fevnir um bókasavn/námsdepil, goymslu og nýggj wc.
   Fyri samanbindingina millum skúlan og ítróttarhøllina, er tað ein fyrimunur at projekteringin verður samskipað, møguliga bygt samstundis.
2. byggistig — fevnir um 3 flokshøli, 3 serstovur, bólkarúm og ventilatiónsrúm.

**Kostnaðarmeting og tíðarætlan:**
Fyri 1. byggistig er kostnaðrmetingin uppá 5,7 mió. kr. íroknað innbúgv og verður skotið upp, at hesin partur verður liðugur á sumri 2004.

Fyri 2. byggistig er kostnaðarmetingin fyri útbyggingina 12,2 mió. kr. íroknað innbúgv. Umbygging og umvæling er uppá 1,6 mió. kr. og verður skotið upp, at 2. byggistig verður liðugt á sumri 2005. Allar upphæddir eru uttan mvg.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at 1. byggistig verður boðið út í almenna høvuðsarbeiðstøku, og at 2. byggistig verður boðið út í almenna fakarbeiðstøku.

**Kollafjarðarnevndin 31. januar 2003:** Kunnað varð um byggiprogramm og dispositiónsætlan viðvíkjandi skúlabygging, sum verður lagt fyri mentamálanevndina tann 5. februar í ár.

**Tilmæli frá arbeiðsbólkinum til mentamálanevndina:**
Arbeiðsbólkurin mælir mentamálanevndini til at samtykkja uppskotið til byggiprogram og dispositiónsuppskot fyri útbygging av Kollafjarðar skúla, dagf. januar 2003, tó við tí ískoyti, at 2. byggistig verður flutt eystureftir, og at ein millumbygningur verður gjørdur millum verandi skúla og útbygningin.

Eisini verður mælt til at játta pening á íløguætlanini 2003 til projektering, og at peningur verður settur av á íløguætlanini komandi ár í samsvari við tíðarætlanina.

Viðvíkjandi ítróttarhøllini í Kollafirði, so ætlar eitt áhugafelag í Kollafirði at taka sær av bygging av ítróttarhøllini, og kemur áhugafelagið at søkja kommununa um stuðul til høllina.

Arbeiðsbólkurin metir málið um ítróttarhøllina tí ikki longur at verða eitt mál hjá bólkinum.

Arbeiðsbólkurin metir seg við hesum at vera lidnan við sítt arbeiði.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og at játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2003 til projektering, kanningararbeiði og útbjóðing av 1. byggistigi og projektering av 2. byggistigi.

**Mentamálanevndin 5. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum í mentamálum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 20. februar 2003:** Framlagt til kunningar.

**Tilmæli:**
Plandeildin mælir til at samtykkja nýtt dispositiónsuppskot, har tilbygningurin er fluttur eystureftir við einum millumbygningi millum verandi skúla og tilbygningin.

Meirkostnaðurin av at flyta tilbygningin vestureftir er 1,1 mió. kr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá plandeildini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2003:** Samtykt at góðkenna dispositiónsuppskotið, dagfest 24. juni 2003, og at kostnaðarmetanin verður hækkað við 1,1 mió. kr.

**Tilmæli frá byggideildini:**
Í sambandi við projektgransking av verkætlanini fyri út- og umbyggingar av Kollafjarðar skúla, var útbjóðingin av arbeiðinum eisini til viðgerðar.

Niðurstøðan av granskingini var, at eftirsum at tíðarskeiðið millum útbjóðingina av námsfrøðiliga tænastudeplinum og útbjóðingin av tilbygninginum bert er fýra mánaðir, so eru fleiri útbjóðingarumfør ikki til fyrimuns fyri byggiarbeiðið. Tí heittu ráðgevarnir á byggideildina um at skipa soleiðis fyri, at tað bert var eitt útbjóðingarumfar fyri allan skúlan.

Grundgevingin fyri at hava eitt útbjóðingarumfar er fyri tað fyrsta, at samlað verður byggingin allarhelst dýrari við fleiri útbjóðingarumførum. Hetta er millum annað orsakað av, at umsitingin av byggiplássinum og byggiplássraksturin verður dýrari, tí stórrakstur ikki fæst burturúr bygginini.

Fyri tað næsta og kanska tað týdningarmesta, so verða bæði arbeiðini í gongd samstundis. Tað fer at geva trupulleikar við arbeiðstøkumørkum, sum møguliga umskarast. Harumframt verður talið av arbeiðstakarum tvífaldað. Hetta kann viðføra trupulleikar at staðfesta ábyrgd á teimum ymsu arbeiðstøkunum, og er tað sera óheppið fyri eitt byggiarbeiði.

Ráðgevararnir hava eisini gjørt vart við, at verður útbyggingin skipað í einum útbjóðingarumfari, fór hetta at stytta um projekteringstíðarskeiðið og er tí góður møguleiki fyri at bjóða øll arbeiðir út í góðari tíð, so vissa fæst fyri, at arbeiðið byrjar 1. juni 2003 og harvið kann ein partur gerast í summarfrítíðini.

Bygginevndin fyri útbyggingina av Kollafjarðar skúla hevur á bygginevndarfundi tann 5. november 2003 viðgjørt áheitanina og samtykti at mæla mentamála-nevndini til at góðkenna, at bygginevndin í útbjóðingini av útbyggingini av Kollafjarðar skúla skipar fyri einum útbjóðingarumfari í fakenterprisum.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá byggideildini.

**Ískoyti:**
Tann 9. juni var lisitatión fyri útbygging av Kollafjarðar skúla.

Fyri arbeiðstøku A komu hesi tilboð inn:

| | | |
|---|---|---|
| **Byggitek p/f** | **kr.** | **11.118.313,00** |
| Sp/f ÁTS | - | 11.258.155,00 |
| Gunnar Waagstein P/f | - | 11.687.440,00 |
| Articon P/f | - | 11.983.000,00 |
| Búsetur og Lützen | - | 12.851.727,85 |
| J.K. Petersen & Valbjørn Dalsgarð | - | 13.044.701,63 |

Fyri arbeiðstøku B komu fylgjandi tilboð inn:

| | | |
|---|---|---|
| Profagólv | - | 182.800,00 |
| Litaval | - | 245.662,57 |
| Gólvbúni | - | 252.310,00 |
| | | |
| **Litaval** alternativt tilboð ¹) | **kr.** | **304.491,00** |
| Gólvbúni alternativt tilboð ¹) | - | 344.358,00 |
| Profagólv alternativt tilboð ¹) | - | 353.250,00 |

¹) Alternativt tilboð fyri DLW Trancparency ístaðin fyri linoleum

Fyri arbeiðstøku B komu fylgjandi tilboð inn:

| | | |
|---|---|---|
| **Ansgar Hansen** | **kr.** | **275.470,00** |
| Magni Jacobsen | - | 331.322,00 |
| Henning Sørensen | - | 397.841,00 |
| Falkenberg | - | 528.545,00 |

Fyri allar arbeiðstøkur kom fylgjandi tilboð inn:

| | | |
|---|---|---|
| J. K. Petersen & Valbjørn Dalsgarð | kr. | 16.877.100,96 |

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at taka undir við tilráðingini frá ráðgevunum. Sí fylgiskjøl 1, 2 og 3.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av fyriliggjandi tilboðum:

| | | |
|---|---|---|
| Byggitek | kr. | 11.118.313,00 |
| Litaval | - | 304.491,00 |
| Ansgar Hansen | - | 275.470,00 |
| LM Electric | - | 1.378.754,00 |
| Reno-Vent | - | 1.940.357,00 |
| Tilsamans | kr. | 15.017.385,00 |

Samlaði kostnaðurin fyri byggingina íroknað ráðgeving, innbúgv, óvæntað og 6,25% mvg verður 20,2 mió. kr.

Samtykt at játta 10,2 mió. kr. av íløgunum fyri skúlar 2004 og 9. mió kr. av íløgunum fyri 2005.

**Fíggjarnevndin 19. juli 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 19. juli 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**103/04** **200401685**

**Millumbygningur ímillum ítróttarhøllina og útbyggingina av Kollafjarðar skúla**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við, at Tórshavnar kommuna er farin undir tvær byggingar innan trivnaðarøkið í Kollafirði, út- og umbygging av Kollafjarða skúla og nýbygging av ítróttarhøll oman fyri skúlan, verður neyðugt at gera ein millumbygning millum ítróttarhøllina og skúlan fyri at natúrliga integrera báðar funktiónirnar á staðnum í tí dagliga virkseminum.

Haraftrat hevur raðfestingin av byggiætlanum kommununnar havt við sær, at ikki slepst undan einum ávísum eykakostnaði í sambandi við statisku relatiónirnar í millum báðar verkætlanirnar.

Stuðlamúrur skal stoypast fyri at tryggja fundamentini hjá ítróttarhøllini, tá farið verður at grava fyri uppíbyggingini hjá skúlanum. Somuleiðis má innroknast ein

meirkostnaður í sambandi við skipan av byggiplássinum, ið ikki lá til grund í kostnaðarmetingini, seinast nevndin játtaði pening til skúlaverkætlanina, orsakað av at rokna var við einum tøkum øki, har ítróttarhøllin nú er staðsett.

Sum ein avleiðing av hesum hevur verið heitt á ráðgevan av skúlaverkætlanini um at gera uppskot og kostnaðarmeting uppá ein slíkan millumbygning.

Hjálagt er:
Uppskot frá MAP arkitektum j. nr. 200401685–2
Kostnaðarmeting frá MAP arkitektum j. nr. 200401685–1

**Byggideildin**
Uppskotið um millumbygningin er gjørt sum partur av útbjóðingini av arbeiðinum uppá skúlan fyri at fáa ein so lágan prís sum gjørligt, og mælir byggideildin til, at nevndin játtar neyðuga peningin, kr. 541.000,00 + mvg, til at lata millumbygningin gera sum ein natúrligur partur av bygginini.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at játta peningin av íløgum á skúlaøkinum 2004.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. juli 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játtað 574.812,00 kr. av íløgum fyri skúlar 2004.

**Býráðið 19. juli 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 18:10**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jákup Suni Joensen | Høgni Mikkelsen |
| Bjarti Mohr | Schumann Hjaltalin | Sjúrður Olsen |
| Beate L. Samuelsen | Tórfinn Smith | Elin Lindenskov |
| Hildur Eyðunsdóttir | Jógvan Arge | Leivur Hansen |
| | Jan Christiansen | |